## Gore til Grønlands




Fyrrverandi grønlendski landsstýrismaðurin Josef Motzfeldt vil hava fyrrverandi amerikanska varaforsetan Al Gore til Grønlands. Josef Motzfeldt, sum var á røðarapallinum í Norðurlandahúsinum í gjár, sigur við KNR, at grønlendingar kunnu skipa fyri einari ráðstevnu sum teirri í Føroyum, og at teir eisini eiga at fáa Al Gore at luttaka. Við KNR sigur Motzfeldt, at hann roknar við at fáa Al Gore til Grønlands næsta ár.

# Størri lesaraskari eggja



*-Føroyskir rithøvundar sita á eini trongari rók og flaksa við veingjunum uttan møguleika at sleppa at flog. Og tað er ikki serliga motiverandi í longdini, sigur Kim Simonsen, rithøvundur og ummælari*

**Føroyskir høvundar fara at seta sær hægri mál, um útlit eru fyri einum størri lesaraskara, spáa ummælarar og rithøvundar**

BÓKMENTIR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

- Koma føroyskar bókmentir ikki við í altjóða, bókmentaliga umrenslið, steðga tær upp. Og tað er júst tað, sum er í ferð við at henda.

So avgjørdur er rithøvundurin og ummælarin, Carl Jóhan Jensen, nú marknaðarføring av føroyskum bókmentum úti í heimi er vorðið eitt afturvendandi kjakevni her heima.

Eisini Kim Simonsen, ummælari og rithøvundur, vísir á vandan við at føroyskar bókmentir byrgja seg inni

- Sum er sita føroyskir høvundar á eini trongari rók og flaksa við veingjunum uttan møguleika at sleppa á flog. Og tað er ikki serliga motiverandi í longdini, sigur Kim Simonsen.

### Í úlvsins kjaft

Hóast breið semja tykist vera um tydningin av at marknaðarføra føroyskar bókmentir úti í heimi, hevur heldur lítið verið at hoyrt um, júst hví tað er so umráðandi, at føroyskir rithøvundar fáa møguleika at gera seg galdandi uttanfyri landoddarnar.

Men rithøvundarnir og ummælararnir, Kim Simonsen, Carl Jóhan Jensen og Arnbjørn Ó. Dalsgarð eru ikki í iva: Ein størri lesaraskari fer sum frá líður at fáa føroyskar høvundar at seta sær hægri mál.

- Tað er sum við so nógvum øðrum. Samanbering við onnur, fær teg at hyggja at tær sjálvum við øðrum eygum og seta onnur krøv til tað, tú gert. Fyri ein føroyskan rithøvunda merkir tað, at hann má trúgva uppá, at hann hevur okkurt at leggja afturat bókmentum í alheims høpi, sigur Carl Jóhan Jensen og leggur afturat, at føroyingar, ivaleyst eisini føroyskir rithøvundar, hava lyndi til halda halda alt ov lítið um seg sjálvan.

- Ein máti at koma burtur frá hasi undirlutakensluni er at taka kappingina upp við onnur. Og fyri føroyskar rithøvundar merkir tað, at teir mugu tora at blaka sínar bøkur í úlvsins kjaft, og so taka tað við, sum kemur, heldur Carl Jóhan Jensen.

Sum er, kemur so at siga onki, sigur Arnbjørn Ó. Dalsgarð, og vísir á, at tað sum oftast er rættiliga tilvildarligt, um ein føroysk bók verður ummæld ella fær nakra reaktión yvirhøvur.

- Rithøvundar skriva jú, tí teir vilja verða lisnir, og tí teir hava nakað uppá hjarta. Tí kann eg ikki ímynda mær annað, enn at útlitið til at fáa ein størri lesaraskara má vera ótrúliga motiverandi fyri skrivihugin, sigur Arnbjørn Ó. Dalsgarð.

### Fótbóltur sum fyrimynd

Júst hvussu marknaðarføring av føroyskum bókmentum fer at ávirka støðið sum frá líður, kunnu vit enn bara gita okkum til. Men Carl Jóhan Jensen heldur tað vera upplagt at samanbera við føroyskan fótbólt í hesum viðfangi.

- Føroysk luttøka í altjóða fótbólti hevur ment fótbóltin her heima á ein hátt, sum vit neyvan høvdu upplivað, um vit ikki kappaðust við teir stóru úti í heimi. Hetlendingar valdu ikki at vera við í altjóða fótbólti, og tí helt øll menning av fótbóltinum har stórt sæð uppat. Tað sama fer at henda við okkara bókmentum, um vit ikki fara út at kappast við onnur, væntar Carl Jóhan Jensen.

Eisini Kim Simonsen heltur tað vera eyðsæð at samanbera vit tað, sum hendir á øðrum økjum, tá farið verður út um landoddarnar.

- Vit síggja jú, hvussu føroyskur tónleikur støðugt brýtur øll landafrøðilig og mental mørk, og hvussu hetta hevur havt eina ótrúliga menning og áræði við sær millum tónleikarar her heima. Vit hava onga orsøk til at halda, at tað sama ikki

# Ein spurningur um dygd



*Vit mugu tora at skyna ímillum góðar og váanaligar bøkur, um vit skulu bjóða tær fram úti í heimi, sigur Carl Jóhan Jensen, rithøvundur og ummælari*

**Hóast dygdin skal vera í lagi, er hon ikki einasta barometrið fyri, um føroyskar bøkur kunnu gera seg galdandi uttanlands**

BÓKMENTIR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Marknaðarføring av føroyskum bókmentum má hava skaldsligu dygdina sum sítt fremsta metingarstøði, staðfesti bókmentafrøðingurin, Erik Skyum-Nielsen her í blaðnum herfyri.

Eisini Carl Jóhan Jensen, rithøvundur og ummælari, tvíheldur um, at skulu føroyskar bókmentir gera sær vónir um at gera seg galdandi uttanlands, má dygdin vera tað berandi.

Spurdur, hvat dygd merkir í hesum høpi, sigur Carl Jóhan Jensen, at dygd ikki so lætt letur seg eyðlýsa.

- Men vit vit nokk øll, nær ein bók er góð. Trupulleikin er, at vit ikki tora at skyna ímillum góðar og vánaligar bøkur. Í staðin dyrka vit tað miðalgóða og siga, at alt er javngott, sjálvt um vit innast inni vita, at tað er nakað øgiligt tvætl

Hóast Carl Jóhan Jensen fýlist á lyndi hjá føroyingum at ógilda dygdarmunin, tá tað ræður um bókmentir, heldur hann, at glottar eru at hóma.

- Á næstan hvørjum ári velur nevndin, ið innstillar til Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins, út eina bók, ið tey meta hevur eina serliga dygd. So leingi, tey tora tað, eru vit á góðari leið, heldur Carl Jóhan Jensen.

### Dygd og sjangrur

Arnbjørn Ó. Dalsgarð, formaður í Rithøvundafelagnum, minnir á, at eitt høgt listarligt støði eigur ikki at vera einasta barometrið fyri, um ein bók er verd at týða og marknaðarføra ella ikki. Møguleikin fyri um ein bók kann gera seg galdandi aðrastaðni veldst eisini nógv um, hvørja bókmentaliga sjangru, hon hoyrir heima í.

Sjálvur er Arnbjørn Dalsgarð rættiliga sannførdur um, at í fleiri førum kunnu føroyskir høvundar væl gera seg galdandi innan sína sjangru.

- Eg kann væl ímynda mær, at Jógvan Isaksen kann fáa enn størri útbreiðslu innan krimisjangruna. Eisini haldi eg at Oddvør Jóhansen er eitt fínt boð uppá ein høvunda, sum kann gera seg galdandi millum tær léttari bókmentirnar, sigur hann.

Ein annar máti at meta um, hvørt ein føroysk bók kann gera seg galdandi, er at hyggja at, hvørjar føroyskar bøkur selja mest í Føroyum, heldur Arnbjørn Ó. Dalsgarð.

- Føroyskir lesarar eru ikki øðrvísi enn lesarar aðrastaðni, so teirra áhugi kundi givið eina góða ábending, heldur formaðurin í Rithøvundafelagnum, sum annars eftirlýsir fleiri virðislønir til føroyskar bókmentir, ið kundu verið við til at mett um støðið.

- Í londunum rundan um okkum er tað heilt vanligt, at eitt nú peningastovnar lata virðislønir til bókmentir, og tað haldi eg eisini at líknandi stovnar í Føroyum áttu at gjørt, sigur Arnbjørn Ó. Dalsgarð.